KLAKSVÍKAR KOMMUNA

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 31.10.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt: Óli M. Lassen
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 84/24 | 23/00804-11 | Sjálvsognarstovnur yvirtaka ognina – Umsorganarheimið Gloria |
| 85/24 | 21/01377-33 | Húsarhaldsskúli í Klaksvík - Íløgustuðul |
| 86/24 | 21/01340-108 | Frábýti av veglendi á Stongunum og harvið frávik frá kravinum um minstamark grundøki í økinum |
| 87/24 | 21/01280-333 | Byggibúningararbeiði - Útstykking á Fossum - meirveiting |
| 88/24 | 23/00572-16 | Sølutorg o.a. |
| 89/24 | 24/01101-3 | Umsókn um sundurbýti (marknaumskipan) millum matr.nr. 618 og 619 í Klaksvík |
| 90/24 | 24/00244-9 | Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 33 og marknaumskipan millum matr.nr. 33 og 28 í Ánunum |
| 91/24 | 21/01685-47 | Endalig avrokning fyri traðaavtalu á Helnabrekku |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 92/24 | 24/01120-1 | Leigusáttmáli |
| 93/24 | 24/01142-1 | Eykajáttan, *fyrra viðgerð* |
| 94/24 | 24/01097-3 | Skuldarumskipan |
| 95/24 | 24/01080-1 | Møguligt keyp av ogn |

**Til viðgerðar**

## 84/24
## 23/00804-11 Sjálvsognarstovnur yvirtaka ognina – Umsorganarheimið Gloria

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 22.10.2024 | 27/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 84/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 84/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 10-10-2024, er greitt gjøllari frá málinum. Í stuttum snýr málið seg um, at nú er komið hartil, at ein samlað fígging kann útvegast, og verður tað tí við hesum lagt fyri nevndirnar aftur til endaliga viðgerð.

Í stuttum er status nú hetta:
- Stýrið fyri Soli Deo Gloria hevur góðkent at selja bygningin til sjálvsognarstovnin "Gloria fastogn"
- Peningastovnur er sinnaður at luttaka í fíggingini við láni til "Gloria fastogn"
- Stovnur hevur játtað verkætlanini stuðul
- Nóg mikið av øðrum stuðulspeningi er fingin til vega saman við eginfígging
- Trivnaðarnevndin E&B hevur tikið undir við málinum, herundir ein leigusáttmála millum kommununa og Gloria
- Tvs. íløga á 11 mkr. (13,0 mkr. – 2,1 mkr. í mvg-afturbering)

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
*Góðkenning av viðtøkunum fyri nýggja sjálvsognarstovnin "Gloria Fastogn" og manning av stýri:*

Í viðgerðini av hesum máli hevur politiska skipanin lagt dent á, at Klaksvíkar kommuna ikki skal gera bindingar millum seg og nýggja sjálvsognarstovnin, sum skal verða óheftur og sjálvstøðugur.

Samskift hevur verið um hetta við uttanhýsis løgfrøðing, sum ger uppskot til viðtøkur fyri nýggja sjálvsognarstovnin, har ásett verður, at býráðið skal velja tveir av fimm stýrislimum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjartøl fyri keyp, dagføring og útbygging av Gloria
- Umsorganarheimið Gloria hevur árini 2018-2024 leigað verandi bygning frá sjálvsognarstovninum Soli Deo Gloria.
- Hesi árini hevur Gloria gjørt munandi nýgerðir og umvælingar av bygninginum, sum upprunaliga varð bygdur í 1974.
- Samanlagt hevur Gloria hesi árini brúkt umleið 2.500.000 krónur til umvælingar, bæði innandura og uttandura.
- Ísv. leiguna frá Soli Deo Gloria er felt inn í sáttmálan, at helvtin av leiguni hesi árini skal dragast frá keypsprísinum.
- Hetta ger tað møguligt hjá sjálvsognarstovninum Gloria fastogn at keypa bygningin fyri ein sera sámiligan kostnað.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

- Vísandi til omanfyristandandi, hevur bygningurin eitt munandi hægri virði enn tað, sum Gloria nú keypir hann fyri.

**Tilmæli:**
Málið verður við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið við tilmæli um at taka undir við málinum, so sum tað nú fyriliggur, herundir at góðkenna uppskot til viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin "Gloria Fastogn", uppskot til leigusáttmála millum KK og Gloria Fastogn, har ein forkeypsrættur verður førdur inn í sáttmálan, og at býráðið velur tvey umboð í stýrið fyri sjálvsognarstovnin.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 22. oktober 2024:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 10.10.24. Nevndin mælir til at umboðini hjá kommununi verða forfólkið í TrN E&B og eitt fólk afturat.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við E&B 22-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 einmælt samtykt, og at bíðað verður við at velja kommunalu umboðini í stýrið til eftir kommunuvalið 12. nov. 2024.

## 85/24
## 21/01377-33 Húsarhaldsskúli í Klaksvík - Íløgustuðul

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 85/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 85/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 28.11.2024 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við, at Klaksvíkar kommuna hevur givið tilsøgn um at gjalda 21 mió. kr. til bygging av nýggjum húsarhaldsskúla í Klaksvík, var fyrr í ár samtykt at stuðla byggingini við 8,0 mió. kr í 2024, og at stuðul uppá aðrar 2,1 mió. kr. skuldi takast upp til viðgerðar seinni í ár.

Verkætlanin hevur gingið væl hóast ymiskar avbjóðingar og er frammanfyri tíð, og fíggjartørvurin er minkaður.

Nærum 8 mió. kr. eru nú útgoldnar til verkætlanina, og støða skal takast til, um manglandi upphæddin smb. dagførdu gjaldsætlanini, áljóðandi kr. 1.263.563, skal útgjaldast í 2024. Tá eru kr. 317.457,69 eftir at útgjalda í 2025, sum má takast við til fíggjarætlanararbeiðið fyri 2025.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Hetta málið stuðlar undir 3. heimsmálið, sum skal tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Upphæddin verður at fíggjað av *tøkum peningi*.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at eykajátta kr. 1.263.563 í íløgustuðuli til Húsarhaldsskúlan.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 24-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 einmælt samtykt.

## 86/24
## 21/01340-108 Frábýti av veglendi á Stongunum og harvið frávik frá kravinum um minstamark grundøki í økinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2024 | 98/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 23.10.2024 | K-33/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 86/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við gerð av parkeringsplássi og atkomuvegi til sethúsaognir á Stongunum eru gjørdar avtalur við eigarar í økinum um neyðugt lendi til veg. Talan er um veg gjøgnum gamalt búøki við smáum grundøkjum. Byggisamtyktarliga staðsetingin er økispartur A10 og A18, har minsta mark grundøki er ásett til 300 $m^2$ fyri vanlig sethús og 150 $m^2$ fyri samanbygd hús og íbúðir.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Biðið verður við hesum um býráðsins játtan til frávik frá ásetingini í byggisamtyktini um minsta mark grundøki, galdandi fyri allar ognir, sum lata lendi til almennan veg- og/ella parkeringsøki.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-10-2024, og vísir á, at talan er um verkætlanina við parkeringsøkinum við Stangavegin.

**Tekniska Nevnd 23. oktober 2024:**
Tilmælið, dagf. 08-10-2024, verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 21-10-2024 einmælt samtykt.

## 87/24
## 21/01280-333 Byggibúningararbeiði - Útstykking á Fossum - meirveiting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2024 | 100/24 |
| 2 Tekniska Nevnd | 23.10.2024 | K-29/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 90/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 87/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Klaksvíkar Býráð samtykti 27. oktober 2022 einmælt at taka upp samráðingar við arbeiðstakaran á Fossum um at enda byggistig nr. 1 á ein forsvarligan hátt og fyri kommununa nøktandi kostnað. Í samráðingunum skuldi eisini kannast, um tað ber til at arbeiða víðari við byggistigi nr. 2, men við lægri virksemi. Upplýst er í málinum, at við lægri virksemi meinast við eina til tvær mió. kr. um árið.

Samráðingarnar við arbeiðstakaran um at sleppa byggistigi 2 og 3 gingu væl, og hevur síðani verið arbeitt sambært nevndu býráðssamtykt.

Eitt arbeiði hevur fingið drúgva umrøðu, sum fevnir um eina skilagóða loysn at grava og planera fyri almennum leiðingum í ovara atkomuvegnum til økið á Fossum, har fleiri randarhús eisini eru staðsett. Fyrimunurin við málinum er, at SEV hevur ynski um, at arbeiðið verður framt og vil gjalda fyri sín part av arbeiðinum. Fyrisitingin ynskir í hesum sambandi at vísa á, at talan er um eitt arbeiði, sum tekniskt er neyðugt at fremja, m.a. av tí orsøk, at ein regnvatnsleiðing (Ø800), sum er partur av avvatningarætlanini á vestursíðuni og er partur av verkætlanini.

**Burðardygd og heimsmálini:**
At fremja undirstøðukervi í einum samfelag, har tørvur er, hevur stóran týdning, og stuðla hesi átøk/verkætlanir væl undir heimsmál fyri burðardyggari menning, t.d. mál nr. 11, at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avsetingin til *Byggibúning sethús* hevur pr. 14-10-2024 eitt yvirtrekk upp á 3,8 mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| Málið um almennar leiðingar kostar sambært meting frá arbeiðstakara | kr. | 3.000.000,- |
| Annað neyðugt arbeiði í 2024 | - | 600.000,- |
| Endurgjald frá SEV fyri leiðingar og tøknihús | - | -1.500.000,- |
| Munur hjá kommununi at gjalda | kr. | 2.100.000,- |

– – –

Mett yvirtrekk á kontuni *Byggibúning Bústaðir* í 2024 verður sambært hesum (avrundað) 6,0 mió. kr.

| | |
|---|---|
| Mettar inntøkur frá grundstykkjasølu í ár á Fossum | |
| Grundstykkir 9 stk. á 450 tkr. | -4,1 mió. kr. |
| Raðhúsastykkir 13 stk. á 250 tkr. | -3,2 mió. kr. |
| Avlop, um grundstykkjasøla verður tikin við | 1,3 mió. kr. |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri standandi frágreiðing verður mælt viðkomandi nevndum og býráði til at geva fyrisitingini heimild til at seta arbeiðið at fremja almennar leiðingar á Fossum í gongd.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-10-2024.

**Tekniska Nevnd 23. oktober 2024:**
Tilmælið, dagf. 14-10-2024, verið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 21-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 einmælt samtykt.

## 88/24
## 23/00572-16 Sølutorg o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 23.10.2024 | 42/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 87/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 88/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Fyrr í ár er samtykt at leggja grót av til útfylling niðanfyri Effo-støðina, umframt at tað er samtykt at samráðast við part, sum áður hevur søkt um øki at byggja íbúðir á. Í hesum sambandi hevur innleiðandi prát verið millum partarnar, har parturin viðvíkjandi sølutorgi, vesihentleikum, vasking av klæðum osfr. hevur verið umrøddur. Talan er um eitt leigumál uppá 79 fermetrar, har mánaðarliga leigan liggur um kr. 10.000,-

Fasilitetirnir, sum verða í hesum partinum av bygninginum, verða atkomuligir fyri eitt gjald. Tvs. um ein skal vaska klæðir, brúka vesi ella brúsurnar, skal eitt gjald rindast. Metta inntøkan fyri hendan partin er eitt stað millum kr. 5-10.000,- um mánaðin. Hendan metingin er grundað á líknandi virksemi í aðrari føroyskari kommunu. Harumframt kemur eisini sjálvt sølutorgið/básarnir.

Í avtaluna verður eisini tilskilaður ein forkeypsrættur til Klaksvíkar kommunu til niðastu hæddina til allan tann partin, sum vendir norður og suður, tilsamans 272 fermetrar.

Øll verkætlanin inniheldur ein grundplan, sum umfatar 2 størri hølir, umframt tann norðasta endan sum er 4 sølubásar, frysti-/kølirúm, rúm til at vaska klæðir, brúsurúm, vesir og umklæðingarrúm.
1. hædd inniheldur 7 íbúðir, sum byggiharrin ræður yvir.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Hetta málið stuðlar uppundir 3. heimsmálið, sum er at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Leigukostnaðurin fyri økið, sum KK skal leiga, er mánaðarliga 10.000,- kr. Í mun til hesa útreiðslu er mett, at inntøkur frá hesum fasilitetunum vera eitt stað millum 5-10.000,- kr mánaðarliga. Harumframt verða inntøkur at fáa frá leiguinntøkum frá sølubásunum. Tvs. er hetta væntandi útreiðsluneutralt.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at nevndin gevur fyrisitingini loyvi til at gera uppskot til sáttmála við byggiharra um leigu av fasilitetum til sølutorg.

**Havna- og Vinnunevndin 23. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 14-10-2024, og mælir til, at umsitingin fær heimild til at gera sáttmála við byggiharran, treytað av, at øll neyðug loyvir koma uppá pláss.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 23-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS og TJL) og 2 atkvøðum ímóti (SVJ og ASB).

## 89/24
## 24/01101-3 Umsókn um sundurbýti (marknaumskipan) millum matr.nr. 618 og 619 í Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2024 | 97/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 89/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til hjáløgdu umskipan í matriklunum matr.nr. 618 og 619 við Vágsheygsgøtu í Klaksvík.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11 – Burðadyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert ummælandi

**Tilmæli:**
Mælt verður til at viðmæla umsóknini

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 21-10-2024 einmælt samtykt.

## 90/24
## 24/00244-9 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 33 og marknaumskipan millum matr.nr. 33 og 28 í Ánunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2024 | 96/24 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 90/24 |
| 3 Ánanevndin | 05.11.2024 | |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 33. Sundurbýtið ber í sær
- at sethúsini við einum uml. 780 $m^2$ grundøki verða matrikulerað burturúr trøðni sum ein sjálvstøðugur matrikul
- at partur av trøðni – uml. 93 $m^2$ verða matrikuleraðir til matr.nr. 28
- at restin av økinum verður liggjandi sum trøð, partvís í fríøki og partvís landbúnaðarøki

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Umsóknin er ikki í tráð við økisbýtið í byggisamtyktini.
Fyri at fremja umsøktu umskipan er tí neyðugt at regulera økismarkið í byggisamtyktini millum A24 (blandað bygging) og G (landbúnaðarøki), soleiðis at hesi samsvara ætlaðu matrikulmarkunum.
Málið er ávegis viðgjørt og viðmælt í Ánanevndini 30. apríl 2024 útfrá fyribils umsókn. Endaliga umsóknin víkir tó frá tí fyrru við eini marknaumskipan millum matr.nr. 33 og 28 (uml. 93 $m^2$), sum ikki var nevnd í fyrru umsóknini.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Nr. 11. Burðadyggir býir og býlingar

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Í matrikulpartinum: Kommunan bert tilmælandi

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting mælir til:
- at fara undir tilgongdina við broyting í byggisamtyktini viðvíkjandi regulering av økismarki millum A24 og G í Ánunum samsvarandi ætlaðum matrikulmarkum
- at viðmæla sundurbýti, treytað av at byggisamtyktarbroytingin verður góðkend
- at Ánanevndin verður kunnað um víðkaðu umsóknina um matrikulumskipan og byggisamtyktarbroyting í november.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá UBN 21-10-2024 einmælt samtykt.

## 91/24
## 21/01685-47 Endalig avrokning fyri traðaavtalu á Helnabrekku

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2024 | 99/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.10.2024 | 89/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2024 | 91/24 |

**Frágreiðing um málið:**
Sum kunnugt gjørdi kommunan í 1980'unum avtalu við traðaeigarar á Helnabrekku um keyp av traðum til bústaðaendamál. Avtalurnar leggja upp til, at partur av endurgjaldinum skuldi útgjaldast í grundøkjum. 1 grundøki uppá uml. 500 $m^2$ pr. byrjaðar 5000 $m^2$ trøð. - Seinni viðgerðir hava heimilað peningaligum útgjaldi heldur enn grundøki, um traðaeigarin ella arvingar hansara ynsktu tað.

Higartil eru keypini avroknaði soleiðis, at 8 grundøkir eru latin, endurgjald er latið fyri 3, og eftir at lata/gjalda eru 4 stykkir. Av teimum 4 eftirverandi ynskir ein útgjald í peningi, meðan hini 3 ynskja at bíða, til trøðin verður ásett.

Eftir samskifti yvir longri tíð um avrokning av seinasta stykkinum fyri matr.nr. 971, boðar arvingur eftir nú frá, at viðkomandi nú gongur frá kravinum um grundøki, men vil heldur avroknast í peningi.
Seinast peningaligt útgjald var viðgjørt av býráðnum, varð samtykt at rinda kr. 165.000,- pr. grundøki, svarandi til miðalsøluprís (kr. 187.500) frátrekt veg- og kloakkgjald, sum sambært gomlu avtaluni er sett til kr. 22.500,-

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kr. 165.000,- fíggjast av *Byggibúning Bústaðir*

**Tilmæli:**
Mælt verður til at útgjalda upphæddina kr. 165.000 til lógligan arving eftir Onnu Madsen, arving eftir Elin Margretu Matras. Tá hetta er avgreitt, er trøðin matr.nr. 971 fult endurgoldin.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-10-2024.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN 21-10-2024.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2024:**
Tilmælið frá FíN 29-10-2024 einmælt samtykt.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 92/24
## 24/01120-1 Leigusáttmáli

## 93/24
## 24/01142-1 Eykajáttan, *fyrra viðgerð*

## 94/24
## 24/01097-3 Skuldarumskipan

## 95/24
## 24/01080-1 Møguligt keyp av ogn

*Fundurin lokin kl. 20:30*